# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:





**1. Tøm Miklagarð**

Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú fært stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

**2. Dreymaferð við nýggju Norrönu**

Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili






**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720




**UTTAN ÚR HEIMI**

# Kvinna slapp umborð á norskt flogfar við seks skammbyrsum

**Tað eydnaðist einari 31 ára gamlari norskari kvinnu at sleppa umborð á eitt ferðamannaflogfar við seks skammbyrsum í taskuni. Minst ein av byrsunum var lødd**

LOFTFERÐSLUEFTIRLIT
*Árni Joensen*

Kvinnan fór fyrst við flogfari úr Oslo til Alta. Har kom hon til ilnar við mammu sína og eina systir, og tað endaði við, at kvinnan stongdi tær báðar inni í baðstovuni í summarhúsunum, sum tær vóru í. Haðani fór tann 31 ára gamla í vápnaskápið hjá pápanum, har hon tók seks skammbyrsur og ein hóp av patrónum, sum hon koyrdi í taskuna.

Um kvøldið fór konan til floghavnina í Alta og har upp í eitt Boeing 737-flogfar hjá felagnum Braathens, sum skuldi til Oslo. Einki eftirlit var í floghavnini, so kvinnan slapp umborð á flogfarið við bæði skammbyrsum og patrónum.

Stutt eftir at flogfarið var farið á flog, eydnaðist tað mammuni og systrini at sleppa út úr baðstovuni, og tær boðaðu alt fyri eitt løgregluni frá, hvussu vorðið var. Løgreglan kunnaði so flogskiparan um, at hann hevði eitt alvápnað ferðafólk umborð á flogfarinum. Eftir at hava hugsað seg um valdi flogskiparin at látast sum einki fyri ikki at órógva kvinnuna. Flogfarið helt tí fram til Oslo, har mannsterkt løgreglulið tók ímóti kvinnuni og handtók hana.

Tá løgreglumenninir hugdu í taskuna, funnu teir eina Smith & Wesson Magnum kalibur 44, eina Smith & Wesson Magnum kalibur 35, eina Smith & Wesson kalibur 38, eina Smith & Wesson kalibur 9, eina Smith & Wesson kalibur 22 og eina Jennings kalibur 22. Minst ein av skammbyrsunum var lødd, og í taskuni hevði kvinnan eisini 225 patrónir.

Norska løgreglan sigur, at kvinnan hevði samband við ein mann, sum er uppi í einum rockarafelagsskapi í Oslo.

# Aftur vandi fyri bakkasti í amerikanska búskapinum

**Bankafólk í USA bera ótta fyri, at tað vánaliga úrslitið hjá amerikanska búskapinum higartil í ár fer at gera ilt verri**

BÚSKAPUR
*Árni Joensen*

Vøksturin í amerikanska búskapinum annan ársfjórðing í ár var 1,1 prosent, og tað var munandi minni enn tey 2,3 prosentini, sum búskaparfrøðingar høvdu væntað. Í fyrsta ársfjórðinginum var vøksturin 5,0 prosent, men tað var eisini minni enn mett, tí metingin frammanundan var 6,1 prosent.

Úrslitini higartil í ár og metingar vísa, at støðan hjá amerikanska búskapinum hetta seinasta árið hevur verið munandi verri, enn stjórnin í Washington higartil hevur sagt, og at talan í veruleikanum var um negativan vøkstur ein stóran part av árinum í fjør. Tað er helst eisini orsøkin til, at tað tykist vera so torført at fáa ferð á hjólini aftur.

Fleiri stúra nú fyri, at tað stóra fallið á partabrævamarknaðinum og tær nógvu fíggjargølurnar í vinnulívinum skulu gera enda á tí sindri av framgongd, sum hevur verið seinastu mánaðarnar.

Samstundis vísa brúkarakanningar, at amerikanarar longu fyri tveimum árum síðani fóru undir at spara pengar heldur enn at keypa nýggjar vørur, og vinnulívið ávarar nú um, at framleiðsluvinnan eigur at fyrireika seg til minkandi sølu.



*Í einari roynd at bøta um álitið á amerikanska vinnulívinum hevur stjórnin hert revsingina fyri roknskaparsvik. Her skrivar Bush forseti undir nýggju lógina*

# Moskva undir í royki av skógareldum

**Myndugleikarnir í Moskva mæltu mikudagin fólki til at halda seg innandura. Ikki færri enn 119 skógareldar herja nærhendis býnum, og tann nógvi roykurin kann vera vandamikil fyri heilsuna**

RUSSLAND
*Árni Joensen*

Í einari ávaring frá læknunum í Moskva stóð, at børn, gomul og fólk við varandi sjúkum áttu at halda seg innandura ella at fara út á bygd at bíða, til roykurin minkar. Hini fingu samstundis tey ráð, at tey eiga at hava okkurt vátt plagg fyri vindeygunum.

Hetta er fyrstu ferð síðani í 1972, at roykur frá skógareldum hevur noytt myndugleikarnar í Moskva at ávara fólk um heilsuvanda. Seinni um dagin boðaði tuberklastovan í býnum frá, at hon væntar munandi fleiri tilburðir av lungnasjúkum í heyst enn onnur ár.

Sløkkiliðini í Moskva siga, at tey hava higartil skrásett 119 skógareldar ymsastaðni kring høvuðsstaðin, og umleið 1.000 sløkkiliðsmenn royna at fáa tamarhald á eldunum. Aðrastaðni í Russlandi stríðast myndugleikarnir eisini við skógareldar. Ringast stendur til har eystsuri í landinum, og úr Sibiria fréttist eisini um skógareldar.

Veðurmenninir siga, at roykurin í Moskva verður helst liggjandi til vikuskiftið, tá teir vænta regn og frískan vind.